# ítróttur

Nr. 246 • hósdagur • 22. desember 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

## Hanus heldur fram í Gøtu

**GÍ veteranurin Magni Jarnskor er settur sum ungdómsvenjari og samskipari í Gøtu, har teir siga seg framvegis arbeiða við at styrkja um besta liðið**

GÍ
*Jóannes Hansen*



*Hóast áhugi hevur verið frá fleiri øðrum feløgunum, so heldur Hanus Jacobsen kortini fram í GÍ komandi kappingarárið*

Fyrst í vikuni fekk Hanus Jacobsen í Gøtu boð um at koma til landsliðsvenjingar annað vikuskiftið í nýggja árinum. Tað eru sjálvandi fleiri stig frá at vera ein av tredivu, sum eru stevndir saman til landsliðsvenjingar, og so at gerast partur av sjálvum landsliðnum. Men talan er stig á leiðini.

Serliga áhugavert er tað hjá Hanusi Jacobsen og hinum - Janus M. Joensen og Rasmusi Nolsøe úr HB - ið mugu roknast at verða møguligir avloysarar til vongverjaplássið í vinstru, sum verður tókt, tá ið nýggi landsliðsvenjarin fer at flyta Súna Olsen fram á miðvøllin. Súni hevur verið fastur maður á vinstra vongverjanum seinastu árini.

Tað hevur verið eitt sindur av óvissu um, hvar Hanus Jacobsen skal spæla næsta ár. Hanus hevur higartil bara umboðað barndómsfelagið í Gøtu. Seinastu vikurnar hava søgur verið at hoyrt um, at okkurt annað felag í Eysturoy skal hava verið sera áhugað í at fáa evnarika spælaran í sín part.

- Hanus Jacobsen fer framvegis at spæla við GÍ, og tað eru vit fegnir um. Vit leggja stóran dent á at varðveita lokala samleikan á liðnum í so stóran mun, sum tað á nakran hátt ber til, og í tí sambandinum er ikki minst Hanus Jacobsen týdningarmikil, sigur GÍ formaðurin Brandur Jacobsen.

GÍ formaðurin sigur, at tað framvegis verður arbeitt við at styrkja um GÍ liðið, og at tað í einstøkum førum ivaleyst verður neyðugt at leita aðra staðni enn bara í Gøtu. Hann vil ikki siga meiri ítøkiligt um, hvat tað er, sum teir arbeiða við, men tað skilst á lagnum, at GÍ kannar, hvussu tað er statt við málverjum og álopsspælarum.

- Um talan verður um útlendingar, so fara vit undir øllum umstøðum at fáa teir henda vegin til royndarvenjingar, áðrenn talan verður um møguligar avtalur um samstarv, sigur GÍ formaðurin.

### Magni upp í leikin

Sambært GÍ heimasíðuni er veteranurin Magni Jarnskor settur í starv hjá felagnum, sum hevur ásannað, at tað er tørvur á at menna ungdómsarbeiðið í felagnum.

Frá ársskiftinum av er Magni settur sum ungdómsvenjari og samskipari. Hann skal hava høvuðsábyrgdina av dreingjaliðunum, sum fevna um dreingir 7-16 ár og av gentuliðunum, sum fevna um 7-14 ára gamlar gentur.

Talan er ikki um fulltíðar starv. Hóast Magni fer at hava høvuðsábyrgdina av yngru liðunum, so fara liðini at hava hvør sín venjara. Síðsta kappingarár royndi Magni seg aftur sum spælara á besta liðnum, eftir at hann hevði verið burturi frá í eitt ár. Magni var tó ikki so nógv á GÍ liðnum, sum hann og teir í felagnum høvdu vónað, tí hann var so nógv darvaður av skaðum.

## Aftur ítróttur á Cippo

**Næsta umfarið í stóru ítróttarkappingini á Cippo verður hóskvøldið**

Undirtøkan var góð, tá Cippo í Havn fyri viku síðani fór undir fyrstu sonevndu Sports-night.

Talan er um tiltak, har luttakararnir kappast í trimum sonevndum Bar-sports kappingum. Kappingarnar, sum eru á Cippo, eru borðfótbóltur, airhockey og pool.

Umframt vinningar fyri hvørt kvøldið, verður talan eisini um ein stóran vinning til tann heilt stóra vinnaran. Talan verður tá um eina fótbóltsferð til Champions League finaluna, sum verður spæld í mai mánaði komandi ár.

**-mørk**



*Airhockey er ein av greinunum, sum kappast verður í á Cippo*

## KÍ hevur keypt sær málverja

Tað verður ein 23 ára gamal breti, sum komandi árið skal verja KÍ-málið, umframt at hann eisini skal virka sum málmansvenjari

Hetta skrivar Norðlýsið á heimasíðu sínari.

Paul Clapson, sum nýggi maðurin eitur, er 23 ára gamal. Hann hevur áður roynt síni fótbóltsevni í Onglandi, Týsklandi og USA, men nú verður tað altso KÍ, sum fær gleði av honum.

KÍ hevur eisini Meinhardt Joensen í málinum, og tað er lítið at ivast í, at hesin fer at geva n‡ggja manninum harða kapping um plássið.

**-mørk**

## AB fær spælara frá B36

**Thomas Hans Rubeksen hevur gjørt avtalu við AB um, at hann næsta ár skal spæla á Argjum**

AB
*Jóannes Hansen*

AB hevur fingið framrættaðan spælara úr Gundadali og út um ánna. Talan er um Thomas Hans Rubeksen. Hann er uppvaksin í HB, men tvey tey seinastu árini hevur hann spælt í B36. Har hevur hann verið partur av besta hópinum. Higartil hevði ungi maðurin ikki megnað at stríða seg til fast pláss á besta B36 liðnum. Síðsta kappingarár var hann ofta á beinkinum, og hann átti lut í fleiri dystum.

AB fyrireikar seg til stóru kappingina, sum tað ivaleyst fer at verða um at vinna næstbestu deildina. Rúni Nolsøe er settur sum spælandi venjari á Argjum. Allan Mørkøre er fluttur úr B36 og í AB, og nú er so ein av liðfeløgunum hjá Allani í B36 farin aftaná honum. Tað er neyvan nakar ivi um, at Thomas Hans, sum er skjótur og hevur nøs fyri at leita málmøguleikarnar upp, fer at fáa meiri spælitíð á besta AB liðnum, enn hann higartil hevur fingið í B36.

Í nakrar vikur hava AB spælararnir vant í Hoyvíks høllini, og sambært AB heimasíðuni - ab.fo - er ætlanin at fara undir uttandura venjingarnar leygardagin 14. januar.